FYLGISKJAL 3

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP**
**Shipowners of the Faroe Islands**

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Tórshavn 15. januar 2020

**Fíggjarmálaráðið**
**Postboks 2039**
**110 Tórshavn**

**Att.: Jákup Eyðfinn Kjærbo**

Okkara tilv./Our ref.
5398-257/Jórun /Reixar-RFH-B-h
Tykkara tilv./Your ref.

## Broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin) til hoyringar

Víst verður til skriv sent okkum 18. desember 2019, har uppskot til broytingar í Tonsaskattalógini verður sent til hoyringar.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip fegnast um, at broytingar eftir ætlan verða gjørdar í lógini, soleiðis at tonsaskattaskipanin verður dagførd og kappingarfør í mun til onnur lond.

Tó hevur felagið viðmerkingar til nakrar ítøkiligar ásetingar í uppskotinum.

**Viðv. § 1, punkt 2 um skrásetingarskyldu (t.e. § 4, stk. 1, 2. pkt. í lógini).**
Mælt verður til, at treytin verður, at skip eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni ella í Føroya Skipaskráseting. Dømi er um skip, sum í dag virka undir tonsaskattalógini og eru skrásett í føroysku skipaskrásetingini. Til samanbering kann sigast, at danska lógin fevnir bæði um skip undir Dansk International Skibsregister (DIS) og Skibsregistret (DAS).

Broytingin í § 4 er ein herðing av verandi lóg, og tí er ikki rætt, at henda broyting fær virknað aftur í tíð frá roknskaparárinum 2019. Hetta átti at verið broytt.

Kravið um skráseting í FAS ella Føroya Skipaskráseting er meinlíkt kravinum um skráseting í FAS, sum bleiv innsett í § 63a í skattalógini í 2017, sí løgtingsmál nr. 3/2017. Í hesum sambandi varð ásannað, at ávís føroysk reiðaríir reka virksemi við bare-boat leigaðum skipum, sum ikki eru skrásett í FAS. Tískil bleiv innsett ein skiftistíð í lógaruppskotið, soleiðis at fyri hesi reiðarí, í tann mun tey nýttu føroyska manning, ella at skipini annars uppfyltu treytirnar fyri at vera skrásett í FAS, kom lógarbroytingin fyrst í gildi, antin í 2025 ella tá verandi leiguavtalur ganga út. Tað eigur tí at vera umhugsað at innseta líknandi skiftistíð í lógaruppskotið um broyting í tonsaskattalógini.

Lógaruppskotið skuldi eisini innihildið eina áseting um ein "ventil" til kravið um FAS skráseting í sambandi við stutttíðar time-charter avtalur, sum reiðarí kunnu blíva noydd at gera, t.d. í sambandi við at egin skip fara til klassing ella umvæling. Time-charter avtalur kunnu ikki skrásetast í FAS ella Føroya Skipaskráseting.

**Viðv. § 1, punkt 5, nr. 6) um 50% markið ísv. sleipivirksemi (t.e. § 5, stk. 1 í lógini).**

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Í viðmerkingunum verður skrivað, at "*um meira enn 50% av virkseminum er í havnum ella kring havnir kann hetta ikki koma undir tonsaskattaskipanina.*" Orðingin "kring havnir" er trupul at handfara í praksis, tí hon er ov ógreið. Tól umborð skulu stilla inn eftir ávísum punktum fyri at staðfesta, hvar skipið er, og tá er tulkingin av "kring havnir" ógreið. Tí er neyðugt at hava greiðan skilnað millum havnir og úti á havi.
Sama orðingin er eisini í donsku viðmerkingunum, og donsk reiðarí hava havt trupulleikar við hesum, tí iviasamt er, hvat "kring havnir" merkir. Tí er greiðari, um viðmerkingarnar einans skilja millum "í havnum" ella "úti á havi", og at orðingin "kring havnir" verður strikað.

Orðingin undir sleipivirksemi "*at hjálpa førum við av egnari framtøkumegi at leggja at í havn*" á s. 5 og s. 12, skuldi eftir okkara tykki somuleiðis verið strikað.

Siðvenja í Danmark hevur víst, at tað er ógreitt hvat meinast við at hjálpa førum við egnari framtøkumegi at leggja at í havn. Er talan bert um virksemi í sjálvari havnini, ella meinast við allan aktivitet sum heild, tvs. eisini í tann mun tílíkt arbeiði fer fram úti á havinum, fyri síðani at enda inni í sjálvari havnini. Lógarteksturin nevnir einki um tílíkt virksemið, og tí er ikki neyðugt at skoyta hetta uppí viðmerkingarnar. Tað er í hesum sambandi nóg mikið, at tað greitt framgongur av viðmerkingunum, at virksemi í havnum er ikki at meta sum virksemi, ið fer fram til sjós.

**Viðv. § 1, punkt 6, nr. 5) um ísarbeiðið (t.e. § 5a, punkt 5 í lógini).**
Eins og við uppteljing av sleipivirksemi er umráðandi, at tað er greitt, hvussu ísarbeiðið verður uppgjørt. Verður tíð brúkt til ísarbeiðið talt við í uppgerðina av sleipivirksemi? Og telur ísarbeiðið við, tá talan er um arbeiðið til sjós?
Hetta eru ivamál, sum kunnu skapa trupulleikar, tá feløg skulu skráseta arbeiðið.

**Viðv. § 1, punkt 8 um virksemi, fevnt av tonsaskattalógini (t.e. § 7, stk. 2, punkt 6 og 7 í lógini).**
Tað hevur stóran týdning, at tonsaskattalógin kann fevna um alt virksemi, sum er knýtt at flutningsveitaranum. Víst verður tí á, at ístaðin fyri at feløg skulu gera eina meting av marknaðarleigu og leiguinntøkum av hølum umborð, so er greiðari um orðingin er meira ítøkilig. Tað, sum er náttúrligur partur av virkseminum umborð, eigur at verða partur av tonsaskattalógini. Hetta merkir ikki bara leiga, men haravi eisini søla, tí hetta er somikið nær knýtt at virkseminum.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip heldur tí, at broytingin í § 7, stk. 2 eigur at verða:

Nr. 6) Leiguinntøka frá útleigan av hølum umborð
Nr. 7) Søla umborð av drykkjuvørum, luktisli, tubbaksvørum, sjokulátu og góðgæti.
Nr. 8) Søla umborð av marglætisvørum til nýtslu á landi, tó bert í tann mun umsetningur frá tílíkari sølu er týdningarleysur í mun til samlaða umsetningin av flutningi og sølu av mati og drykkjuvørum til nýtslu umborð.
Nr. 9) Søla av útferðum, sum partur av pakkaferð við skipi, sum nevnt í § 4.

Orðingin, sum felagið skýtir upp, er betur egnað umsitingarliga, tí tá fylgir fevnt virksemi sama uppgerðarhátti, sum lógin annars krevur.

**Viðv. § 2, stk. 3 um virknað (t.e. § 7, stk 1 og stk. 2 í lógini)**
Í mun til at lógin skal hava virknað frá og við inntøkuárinum 2016 verður vísti til § 1, nr. 7. Tað er umráðandi at tryggja, at alt virksemi verður fevnt av skiftisreglunum, og tí er neyðugt at seta § 1 nr. 8 inn eisini. Tvs. at orðingin verður: "§ 1 nr. 7 og nr. 8 hevur virknað frá og við inntøkuárinum 2016." Greinin verður síðani dagførd samsvarandi hesum.

Vinarliga
Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Jórun Gardar